# Felags gongutúrurin 2026



Góðu foreldur og næmingar.

Felagsgongutúrurin hjá Skúlanum við Løgmannabreyt verður mikumorgunin 17. juni 2026 kl. 8.

Vit møtast á økinum við bussteðgistaðið við Norðastahorn. Um fleiri koyra saman, verða færri bilar og so minkar ferðslutrýstið eisini
Koyr soleiðis, sum víst er á myndini – hetta fyri at fáa ferðsluna at ganga so væl sum til ber. Um bussurin kemur, má hann fáa pláss




Vit ganga gjøgnum Norðastahorn niðan á gøtuna móti skótadeplinum.

Síðani eftir gøtuni niðan á Kleynisvarða.

Hagani yvir í Villingadal, fram við Villingafossi og so eftir gøtunum yvir í skúlan.

Minnist til at vera ílatin eftir veðrinum, at hava matpakka við og kanska okkurt at drekka!

Vinarliga leiðslan